

## Rógvi Baldvinsson hevur fingið landsliðsboð

Rógvi Baldvinsson er við í føroyska landsliðshópinum, sum skal spæla móti Slovenia og Norður-Írlandi. Tað skrivar heimasíðan hjá Fótbóltssabandinum. Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur sent boð eftir verjuspælaranum, sum hevur staðið seg væl á U21-landsliðnum. Erling Jacobsen, Víkingur, hevur givið avboð, og tí er Baldvinsson boðsendur. Rógvi Baldvinsson er knýttur at hópinum hjá Ålgård, sum spælir í næstbestu deildini í Noregi.

*uni@sosialurin.fo*



*Lassin Isaksen, umboð fyri føroysku fótbóltsdómararnar*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

# Skríggjandi tørvur á fótbóltsdómarum

**FÓTBÓLTUR** – Tað eru ov fá, sum ynskja at døma, sigur Lassin Isaksen, sum er umboð fyri dómararnar

**Uni Holm Johannesen**

Tað er skríggjandi tørvur á fótbóltsdómarum í Føroyum.

Feskastu dømini eru, at Rúni Gaardbo, Eiler Rasmussen og Petur Reinert hava dømt tveir landskappingardystir í Vodafonedeildini í sama leikumfari í september.

Lassin Isaksen, sum er umboð fyri dómararnar, sigur, at tað er ikki nøktandi, at dómarar døma tveir týðandi Vodafonedystir eftir tveimum døgum.

– Dómarar hava, eins og spælararnir, tørv á hvíld. Men vit hava ikki aðrar møguleikar, tí tað eru fáir at velja millum, sigur Lassin Isaksen.

Trupulleikin var í farna mánað, at fýra av teimum átta dómarunum, sum døma í bestu deildini, vóru ikki tøkir vegna uttanlandsferðir og skaðar.

Lassin Isaksen vísir á, at Fótbóltssambandið kann ikki seta sum krav, at dómarar ikki fara av landinum í arbeiðsørindum og øðrum. Tað er eingin sáttmáli, sum leggur fót fyri teimum.

– Dómarar døma, tí teir vilja. Ikki tí, at teir eru tvungnir. Vit hava ongan rætt at forða teimum, vísir hann á.

### Trupulleikin í feløgunum

Fótbóltssambandið roynir at knýta so nógv folk at dómarahópinum sum tilber.

Tað eydnast ikki nóg væl.

Men trupulleikin er ikki beinleiðis hjá Fótbóltssambandinum.

Tað er fyrst og fremst uppgávan hjá feløgunum at skapa áhugan fyri døming, sum støðan er. Feløgini tekna dómarar til dómaraskeiðini, sum Fótbóltssambandið skipar fyri.

– Vit taka síðan hond um einstaka dómaran. Men tað eru ov fá, sum ynskja at døma. Tað vísir uppmøtingin til byrjunarskeiðini, sum ikki er nøktandi, sigur Lassin Isaksen.

### Ikki nøktandi

Tú sært sjáldan uttanlands, at fótbóltsdómarar døma tveir landskappingardystir í sama leikumfari.

Føroyska fótbóltssambandið hevur ikki aðrar møguleikar.

– Dómarar ynskja, og hava tørv á, fyrireiking til dystirnar. Fótbóltsspælarar kunnu heldur ikki spæla tveir dystir við fullari megi eftir tveimum døgum. Tí ávirkar tað eisini dømingina, at dómararnir ikki fáa neyðugu hvíldina, sigur Lassin Isaksen, sum staðfestir, at Petur Reinert, Rúni Gaardbo og Eiler Rasmussen komu væl frá uppgávunum, hóast strævnu skránna.

*uni@sosialurin.fo*

**Dómaraúrmælingur**
er heitið, sum verður nýtt um teir, sum Fótbóltssambandið metir, eru førir fyri at døma í bestu deildini.

*Í løtuni eru hesir dómaraúrmælingar:*
- Petur Reinert
- Lars Muller
- Rúni Gaardo
- Dagfinn Olsen
- Páll Augustinussen
- Eiler Rasmussen
- Ransin N. Djurhuus
- Bárður Mortensen




*Christian Lamhauge Holst*

# Holst vann fyri triðju ferð

**SUPERLIGA** Triðja dystin á rað vann Silkeborg. Mótstøðuliðið seinnapartin í gjár var Sønderjyske, sum fór av leikvøllinum í Silkeborg við ongum

**Rólant Waag Dam**

Talan gjørdist nevniliga um 3-1 sigur til heimaliðið. Føroyski landsliðsleikarin, Christian Lamhauge Holst, hevur skotið fleiri mál seinastu dystirnar, men taldist ikki millum málskjúttarnar í dag. Hann byrjaði á beinkinum, men tá hann kom inn eftir steðgin, var hann maðurin aftanfyri seinasta málið í dystinum, umframt at hann hevði nakrar royndir móti málinum hjá Sønderjyske. Troels Bech, venjari hjá Silkeborg, segði undan dystinum, at uppgerðin móti Sønderjyske var ein sannur lykladystur hjá Silkeborg í heyst. Henda lykladyst vunnu Troels Bech og hansara menn, og liggur Silkeborg harvið nummar sjey í bestu donsku fótbóltsdeildini við 13 stigum. Sama stigatal hevur bæði Sønderjyske og AC Horsens. Og tað er av sonnum tætt í Superliguni nú. Hóast 13 stig, so er bara eitt stig niður til Esbjerg, sum liggur skeivu megin niðurflytingarmarkið. Hinvegin eru bara tvey stig upp til Brøndby, sum er á fjórða plássi, sum gevur atgongd til altjóða fótbólt næsta ár. Fremstir í donskum fótbólti eru sjálvandi FCK. Teir eru tíggju stig frammanfyri FC Midtjylland á øðrum plássi.

*rolant@sosialurin.fo*